Leiðari til handilin hjá P/F Frants Restorff

Søkt verður eftir leiðara til Handilin. Hetta er ein miðalstórur handil, ið eisini selur bakaravørur. Fyri rætta persónin er hetta eitt sjálvstøðugt og spennandi starv, har tú hevur dagligu leiðsluna av handlinum og starvsfólki tess um hendi.

Miðað verður ímóti at fólk, ið søkja, hava hesar førleikar:

- Hava royndir frá arbeiði í handli
- Kunnu arbeiða sjálvstøðugt
- Hava evni at skipa fyri og at samstarva

Starvið er leyst at søkja. Um neyðugt vilja vit bíða í eina tíð fyri at fáa rætta viðkomandi til handil okkara.

Nærri uplýsingar kunnu fáast við at venda sær til P/F Grannskoðarafelagið Rasmussen & Weihe.

Løn sambært avtalu.

Skrivlig umsókn skal sendast til P/F Grannskoðarafelagið Rasmussen & Weihe.

RASMUSSEN & WEIHE
Statsautoriserað grannskoðarafelag P/F
An associated firm of PRICEWATERHOUSECOOPERS

Á Glaðsheyggi
P.O. Box 30
FO-110 Tórshavn
Tlf. (+298) 311017
Fax (+298) 311018
Sp/f nr. 267
e-mail:
rasmussen@rasmussen.fo
Http://www.rasmussen.fo

Kunngerð

Vegna broytta skúlagongd hjá Miðnámsskúlunum á Kambsdali, verður kommunala bussrutan henda frá mánadegi 8. apríl 2002 at rokna.

Av Kambsdali:	Úr Fuglafirði:
kl. 07.40	**kl. 07.50***
09.40	10.40
12.00	12.30
14.00	14.30
14.50	15.25
15.15*	16.00
16.30	17.45
18.30	18.45
19.30	20.00
19.30	20.30

*** Broyttar fráfaringartíðir til fyrr kunngjørda ferðaætlan.**

Fuglafjarðar býráð

Sosialurin -har tað hendir

STEMPIL OG SKRÚVU KOMPRESSARIR

Stationerir og transportablir størri samt smærri

Fáast í flestum støddum til øll endamál
verkstøð. fiskavirkir, alibrúk, entreprenørar v.m.

Kaj Andreasen & Co
Heilsøla, smásøla og umboð - Tel. 315600 - Fax 318008

12. mai kl. 15.00 í Ítrottarparkini

FCK - Brøndby

Úr Føroyum 9. mai kl. 20.40
Aftur til Føroya 13. mai kl. 08.55

Prísur: kr. 1.995,-
við í prisinum er atgongumerki, rundtur við Toda í Parkini og ferðaavgjald.
Avmarkað nøgd.

ROCKSHOW 2002
EYEQ, DEN GALE POSE, TV2 COWGIRLS, SAYBIA
FCK og RockShow skipa fyri konsert í Fælledparken í Keypmannahavn 11. mai.
Les meira á www.fck.dk

Sosialurin
í samstarvi við Atlantic Airways

ATLANTIC AIRWAYS
Tlf. 34 10 40 - Fax 34 10 01
www.atlantic.fo

Gravsteinar, kantsteinar og blómubeð

Nú eisini úr Føroyskum gróti

Skjót levering

Prísir við litmyndum verða sendir kring landið og til útlandið

Danstein
Tel. 447512
Tel. 217512
Tel. 318323
Fax 449961
www.danstein.fo
RUNAVÍK - R. C. EFFERSØESGØTA 19, TÓRSHAVN

Sosialurin - 311820

Bátafelagið á Bakka

Aðalfundurin hjá Bátafelagnum niðri á Bakka á Glyvrum verður **sunnudagin 21. apríl 2002**. Fundurin verður kl. 17.00 í róðrarneystinum hjá Kapprróðrarfelagnum NSÍ.

Bátafelagið á Bakka

Sølufólk

Søkt verður eftir fólki at byrja skjótast gjørligt. Starvið er fulltíðarstarv og fevnir um sølu av eykalutum til bilar.

Væntað verður, at tann, ið settur verður í starv, hevur kunnleika og áhuga fyri bilum, dugur at arbeiða sjálvstøðugt, hevur kunnleika til edv á brúkarastøði, koyrikort og helst dugur norðurlendskt og enskt mál.

Áhugað verða biðin um at ringja til Billutir tlf. 421605 ella fartlf. 210095.

Billutir
410 Kollafjørður

Stevningsmaður

Søkt verður eftir stevningsmanni fyri Tórshavnar kommunu frá 1. mai 2002.

Umsóknir verða at senda Dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøta 1, postbox 28, 110 Tórshavn, innan 15. apríl 2002.

Løn og setanarviðurskifti eru sambært kunngerð frá Justitsministeriet frá 1. juli 1998.

Sorinskrivarin í Føroyum,
tann 4. apríl 2002

Jørgen B. Petersen, adm.

Felagið F B V

felagið fyri bilhandlarar og verkstaðareigarar heldur aðalfund samb. § 6 í viðtøkum felagsins

týsdagin 23.04.02 kl. 14.00

í hølum Havnar handverksmeistara, Sjúrðargøta 20, Tórshavn.

Nevndin

Veðrið
Bilar
Lýsingar
Tíðindi
Viðmerkingar
Ítróttur
Nøvn
Skráir
Tiltøk
Sosialurin

Kunning

Ferðaætlanin 2002

Mánadagin 8. apríl kemur nýggja summarferðaætlanin hjá Strandfaraskipum Landsins í gildi.

Um tú ynskir nærri upplýsingar, kanst tú ringja til rutuupplýsingina á tlf. 34 30 30 ella hyggja á heimasíðuna www.ssl.fo

STRANDFARASKIP LANDSINS

Høvuðsuppgávan hjá fyritøkuni er at lúka landsins tørv á innanlanda fólka- og farmaflutningi, og skal fyritøkan í so stóran mun sum gjørligt rekast á handilsligum støði. Fólka- og farmaflutningurin setir stór krøv um eina góða kundatænastu, herundir trygd, reglusemi og skjótleika.
Árliga rakstrarætlanin hjá Strandfaraskipum Landsins javnvigar við yvir 150 mió. kr. Talið á starvsfólkum svarar til 180 fulltíðarstørv, herav umleið 155 operatørar. Talið á flutningsanleggum er 11 skip, 40 bussar og 15 lastbilar. Flutningsuppgávurnar fevna um alt landið.

Sosialurin
www.sosialurin.fo

Fólkaflokkurin
Treyst, trygd og trivni

Annika Olsen
www.annikaolsen.net

POLITISK MUSIK CAFÉ

í Glamuni í Kvívík

Soffi Egholm bjóðar vegna Norðstreymoyar Javnaðarfelag til politiska musik café mánadagin 8. apríl 2002 kl. 20.00

Her verður kaffi, køkur, sangur og politiskt kjak

Luttakarar verða: Valevnini fyri Norðstreymoy:

Soffi Egholm
Gunnvá Mortensen
Hans Jákup Simonsen
Hans Pauli Strøm

Gestir: Ingeborg Vinther og Kristian Magnussen
Tónleikur: Jens Marni Hansen / Kollafjørður

Øll eru hjartaliga vælkomin

Javnaðarflokkurin

BØN FYRI LØGTINGSVALINUM 30/4-2002

Rættvísi lyftir tjóðina upp, men syndin er vanæra tjóðanna.
Orðt. 14:34

Undirritaði felagsskapur ynskir at heita á alt Guds fólk um aktivt at biðja fyri komandi løgtingsvali. Bøn hevur alstóran týdning, og bert gjøgnum bøn kunnu vit útloysa vilja Guds yvir okkara land og fólk.
Okkara vissa er, at Harrin vil svara bønum fólksins, so at tey sum fara at mynda komandi Løgting og Landstýri, eru frammanundan útvald av Harranum, og dýrd Guds verður opinberað í okkara tjóð.

Vit síggja fyri okkum eina tjóð:

1. har mutur og órættvísi eru burturbeind,
2. har sosiallóggávan er nøktandi og rættvís fyri øll, so øll trívast í okkara landi,
3. har okkara landstýrisfólk ikki taka við falsi, men at tey kunnu hava sannar og vísar ráðgevarar,
4. har okkara fólkavaldu hava eitt lívsmynstur, so tey kunnu vera góðar fyrimyndir fyri fólkinum,
5. har politiski myndugleikin umsitir okkara tilfeingi við vísdómi, so at
a. Føroyingar kunnu liva av tí tilfeingi, sum Harrin hevur givið okkum,
b. Føroyar kann verða til signing fyri aðrar tjóðir og serliga Ísrael,
c. Føroyar megna at standa uttanfyri ES.

Biðið tí eftir at persónar koma til valdið sum:

1. Eru gudsóttandi, fremja rættvísi og hata mutur (Orðt. 29:2,4).
2. Vilja taka sær av søk teirra, sum lítið hava at týða og tala fyri tey málleysu og hjálparleysu (Orðt. 29:7,14 og Orðt. 31:8-9).
3. Ikki vilja lurta eftir falskleika/lygnarorðum (Orðt.29:12).
4. Sum hava høgan moral og vilja geva Gudi æruna (Orðt. 31:3-5 og Róm.4:20).
5. Sum hava hugsjónir fyri landinum og fólkinum (Orðt. 29:18).

Heitt verður á teg, sum er trúgvandi, um at seta tína atkvøðu í trá við tað, sum Andi Guds talar til tín!

1000 forbiðjarar fyri Føroyar